Dp105

# Tilmelding til sjálvbodnu dagpeningatryggingina

Til sjálvstøðugt vinnurekandi ella stjórar í feløgum, sum í sambandi við sjúku ella skaða, ynskja at tryggja sær inntøku í hesum sambandi, kunnu tekna trygging í sjálvbodnu dagpeningaskipanini.

**Umsøkjari**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Navn | | | | P – tal | |
| Bústaður | | | | Telefon | |
| Býur | | Postnr. | | Fartelefon | |
| Teldupostur | | | | | |
| Starvsheiti | | | | | |

**Eg ynski at tekna trygging sum**

| | | | |
|---|---|---|---|
| ☐ Sjálvstøðugt vinnurekandi | | ☐ Stjóri í egnum felag | |
| Stjóri í egnum felag, Navn felagsins | | V – tal | |

**Váttan um eigaraviðurskifti í egnum felag**

Stjórar í egnum felagi, skulu skjalprógva eigaraviðurskiftini í felagnum við at viðleggja avrit av eigarabók ella váttan frá grannskoðara um eigaraviðurskiftini.

| | |
|---|---|
| ☐ Avrit av eigarabók | ☐ Váttan frá grannskoðara |

**Váttan**

Undirritaði/-a gevur Almannaverkinum loyvi at útvega upplýsingar frá skattamyndugleikunum um míni inntøkuviðurskifti og um eg eri stjóri í egnum felag, lønarútgjaldingar hjá felagnum.

| Dagfesting | Undirskrift |
|---|---|
| | |

**Gjald og tíðarskeið**

Tryggingargjaldið verður goldið tvær ferðir um árið.

Tryggingargjaldið verður goldið frammanundan fyri hvørt hálvárið í álmannakkaárinum.

Krøv verða send út ávikavist áðenn 1. juni og 1. desember.

**Er kravda tryggingargjaldið ikki goldið í seinasta lagi ávikavist 1. august ella 1. februar, fellur tryggingin burtur.**

Almannaverkið sendir út áminningarskriv áðrenn, tryggingin fellur burtur.

Tá tryggingartakari hevur meldað seg í tryggingarskipanina, verður kravt tryggingargjald fyri tíðarskeiðið frá degnum, viðkomandi fær rætt til dagpening, og til ávikavist tann komandi 30. juni ella 31. desember.

Fyrsta kravið eftir upptøku verður sent saman við einum váttanarbrævi og skal vera goldið innan 4 vikur eftir dagfestingina á váttanarbrævinum. Annars fellur tryggingin burtur.

**Umsóknin skal sendast ella latast inn til Almannaverkið.**


Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

almannaverkið

# Tilmelding til sjálvbodnu dagpeningatryggingina

Til sjálvstøðugt vinnurekandi ella stjórar í feløgum, sum í sambandi við sjúku ella skaða, ynskja at tryggja sær inntøku í hesum sambandi, kunnu tekna trygging í sjálvbodnu dagpeningaskipanini.

## Brot úr lóg og kunngerð um sjálvbodnu tryggingina

**Persónsskarin**

Sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í feløgum kunnu sambært løgtingslóg tekna sjálvbodna trygging, ið gevur rætt til dagpening og skyldu at rinda tryggingargjald sambært ásetingunum í lóg og kunngerð.

Við sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar er at skilja, at viðkomandi virka sum sjálvstøðug ella stjórar í feløgum í so stóran mun, at eitt møguligt vanligt løntakaraarbeiði við síðuna av bert er at meta sum viðfániingur. Sí meira á heimasíðuni www.av.fo

**Burturfall og útmelding**

Tá ið tryggingartakari meldar seg úr tryggingarskipanini ella verður útihýstur, fellur rætturin til dagpening sambært tryggingini burtur við virknaði frá tí 1. í næstkomandi mánaði.

Meldar tryggingartakari seg úr tryggingarskipanini, verður ov nógv goldið tryggingargjald afturrindað.

**Uppafturtøka**

Ynskir tryggingartakari at verða uppafturtikin í tryggingarskipanina, skal hann senda inn nýggja umsókn um upptøku.

**Tryggingargjaldið**

Tryggingargjaldið til sjálvbodnu tryggingina verður goldið hálvárliga. Hálvárliga upphæddin verður kunngjørd á heimasíðuni hjá Almannaverkinum.

Tryggingargjaldið verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári.

Almannaverkið kunnger javnaða tryggingargjaldið í seinasta lagi 15. November.

**Dagpeningatíðarskeiðið**

Útgjaldingin av dagpeningi heldur uppat, tá móttakarin aftur er arbeiðsførur, uttan mun til, um hann fer í vinnu aftur ella ikki.

Dagpeningur verður í mesta lagi veittur í 52 vikur frá 1. fráverudegi í einum 18 mánaða skeiði.

Hóast ásetingina um 52 vikur, kann dagpeningur verða veittur longur enn 52 vikur

1. tá persónur hevur álvarsliga ella lívshættisliga sjúku ella hevur verið fyri skaðatilburði, har tað ikki ber til at siga, um viðkomandi verður varandi sjúkur ella aftur vinnur sær arbeiðsføri, ella
2. tá persónur í sambandi við álvarsliga sjúku ella skaða er í viðgerð, og har tað er sannlíkt, at viðkomandi aftur vinnur fult arbeiðsføri.
3. Upp til 2 ár í málum um arbeiðsskaða, sum eru fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum, og sum verða viðgjørd eftir løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin).

Tá dagpeningarætturin er brúktur í einum samanhangandi 18 mánaðar tíðarskeiði, kann dagpeningur bert útgjaldast í einum framhaldandi dagpeningatíðarskeiði, um viðkomandi aftur hevur verið arbeiðsførur, og í byrjanini av nýggja sjúkratíðarskeiðinum, lýkur treytirnar um tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Persónur, sum hevur tryggjað seg í sjálvbodnu dagpeningatryggingini, og sum hevur brúkt dagpengarættin upp, skal ístaðin prógva, at hann aftur hevur verið arbeiðsførur, og at tað eru gingnar minst 5 vikur, innan hann av nýggjum er vorðin sjúkrameldaður.



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo